


Napoleon Nolsøe:

# Fyrsti føroyski læknin

**Napoleon Nolsøe var framburðsmaður innan læknaøkið. Men samstundis var hann løgtingsmaður, tónleikari og savnari av kvæðum. Hann er grivin undir liðuni á konuni og vermammuni**


**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Fram til 1842 var bert ein lækni í landinum. Tá kom Napoleon Nolsøe (1809-1877) heim til Føroya eftir lokna útbúgving í Keypmannahavn og setti seg niður sum privatpraktiserandi lækni í Havn.

Hann var sonur Anne Cathrine Pedersdatter og Jákup Nolsøe, handilsforvaltara, beiggja Nólsoyar Páll.

Ofta hevði verið sagt, at ein einsamallur lækni var ov lítið til allar Føroyar. Landslæknin, sum tá var (C.Regensburg), var tó ikki ovurfegin um at fáa ein kappingarneyta.

Nolsøe var tað betri fyri enn Regensburg, at hann var føroyingur, og fólk fóru heldur til ein føroyskan lækna enn ein danskan.

Napoleon fekk eisini rætt til at selja heilivág. Hann hevði eisini tann fyrimun, at hann ikki eins og landslæknin hevði skyldu at fara út á bygd í læknaørindum.

## Suðuroy fær lækna

Teir, sum høvdu longst veg til lækna, vóru suðuroyingar, og teir strongdu á at fáa egnan lækna. Tað fingu teir eisini í 1852, og tað gjørdist Napoleon Nolsøe. Hann varð settur á Tvøroyri, har tað tá bert vóru fimm hús. Men her var handil, og so kundu fólk fara læknaørindi, tá tey fóru til handils.

Napoleon Nolsøe varð í Suðuroy til 1858, tá ið hann varð settur sum landslækni og kom aftur til Havnar. Hann sat í hesum starvi fram til 1865.

Eitt sum Napoleon Nolsøe stríddist ímóti var "florerende kvaksalveri," t.v.s. ólærd fólk, sum so ella so kundu lekja sjúkur.

Ein av teimum, hann var í herna við, var katólski presturin Johan Georg Bauer. Tað skiltist, at Bauer hevði lekt fleiri, ið ikki kundu fáa nakra hjálp annars. Hetta gjørdi, at Napoleon Nolsøe gjørdist hansara erkafíggindini. Í einum brævi 26. juni 1859 sigur Bauer frá, hvussu læknin hevði skrætt ein kross og medaljuna av bringuni á einum sjúkum manni og hevði traðkað á hesar lutir og sagt, at maðurin hevði givið seg "Fanden i vold." Í einum brævi til Bauer hóttir læknin við at melda hann. Til hetta svarar Bauer, at hetta hevði sær dámt væl. Eingin klaga varð tó send.

Bauer vann ein vissan tokka millum fólk, og tað var hann, sum lekti ringu eygnasjúkuna hjá Lamba Poul á Hvítanesi, og kann hetta hava gjørt, at Lamba Poul og konan fóru yvir til katólsku trúnna.

Men hinvegin, so lærdi Napoleon Nolsøe fólk í útoggjunum sjúkrarøkt, so tey kundu geva bráviðgerð, um hetta gjørdist neyðugt. Maria Skylv Hansen greiðir frá einum Pól, sum á hendan hátt gjørdist álitið hjá Mykinesfólki.

Napoleon Nolsøe skipaði eisini fyri ljósmøðraskeiðum. Hetta gjørdi hann fimm ár uppí rað frá 1861-1865. Tað vóru upp til fimm næmingar hvørja ferð. Teir fingu innivist á hospitalinum, har teir eisini kundu læra um reinføri.

Napoleon Nolsøe var týðuliga errin tá ið hann í 1865 kundi boða frá, at hann hevði upplært 10 ljósmøður.

*(Kelda: Elin Súsanna Jacobsen: Slóðir í Heilsuverksøguni.)*

## Savnaði eisini kvæðir

Napoleon Nolsøe gjørdi seg eisini galdandi á øðrum økjum. Eitt var við innsavnan av kvæðum.

Longu í Keypmannahavn skrivaði hann upp kvæði, og helt á við hesum eftir, at hann var komin heim til Føroyar.

Eftir hann liggur kvæðabók í trimum bindum í handriti frá 1840-51.

Her kann nakað verða endurgivið úr fororðunum til hansara kvæðasavn,:

"Líkasum okkara grannar íslendingar í forðum hava skrivað forna manna brøgd og goymt í skinnbøkur at okkara døgum og harí sýnt okkum so mangt, sum hevur verið fjalt fyri okkara eygum, soleiðis hava okkara reystu landsmenn í forum yrkt um forna manna brøgd, bæði um útlendskar og landsmenn, og hesi somu kvæði og táttar hava teir goymt, ikki í skinnbókum, men í huganum mann eftir mann at okkara døgum. Tað má vissarliga haldast fyri eitt tekin, sum valla finst makan til, at øll tann mongdin av táttum og kvæðum, sum finnast her í landi hava kunnað hildið seg so væl í so mong hundrað ár, tó at tey ongatíð hava verið uppskrivað. Men líkaleiðis hevur tað gingið við okkara føroysku tungu; hon hevur hildið seg higar til dags so rein og óblandað, rætt sum í Sigmund Brestissons døgum, hóast tann danska tunga hevur verið okkum páskotrað meira enn 400 ár."



HER JORDEDES PENSIONERET LANDCHIRURG NAPOLEON NOLSØE DEN 3. MARTS 1877 OG DENNE STEN ER SAT AF HANS VENNER TIL MINDE OM HVAD HAN HAR VÆRET FOR DEM I SIN TID



*Napoleon Nolsøe*



*Henrietta Nolsøe, kona Napoleon, teknað av William Heinesen*



*Hetta er forsíðan á fyrsta bindi av kvæðunum hjá Napoleon Nolsøe. Tey trý bindini eru skrivað í 1840, 1842 og 1851. Handritini vóru keypt av Føroya Amts Bókasavni í 1934 á uppboði hjá búgvinum eftir Johannes Djurhuus, apotekara, fyri 10 kr. Tilsamans eru 109 kvæðir í savninum.*

## Doktaraørindi hjá eiðismonnum

Mourentius Viðstein hevur eina áhugaverda frásøgn um læknaørindi til Napoleon Nolsøe.

Eiðismenn vóru farnir við stórum báti til Havnar í doktaraørindum. Teir vóru bæði heitir og sveittir, tá ið teir løgdu at landi í Havn, og Jógvan í Myrmannsstovu varð sendur niðan í Nólsoyarstovuna eftir gamla doktara, sum teir nevndu Napoleon Nolsøe. Jógvan var lættur á fótum, og skjótt stóð hann í durunum í Nólsoyarstovuni.

Napoleon, ið eins og kona hansara Henrietta, var ógvuliga musikalskur, sat júst við klaverið og spældi, beint sum Jógvan læt dyrnar upp. Jógvan lat dyrnar spakuliga aftur eftir sær, styðjaði seg afturat durastavinum og lýddi hugtikin á henda vakra musikk. Ørindini, hann hevði, vóru horvin honum úr huga.

Bátsmenninir hjá Jógvan ótolnaðust, tí eingin maður kom aftur, og teir sendu so ein at vita, hvussu vorðið var, um doktarin ikki var heima, ella hann var tarnaður av onkrum. At Jógvan stóð í durinum í Nólsoyarstovuni og lýddi á føgru tónar, ið doktarin við klaverið lat ljóma um alla lonina, tað vardi ikki ein á bátinum. Maðurin lat dyrnar heldur harðliga upp í Nólsoyarstovuni, og bilsin var hann, tá ið hann sá Jógvan standa sum negldur at durastavinum.

"Er doktarin ikki heima?" spurdi maðurin, tað var ikki meira enn hann fekk orðið fyri seg. Men Jógvan knýtti báðar hendurnr móti honum.

"So-so-so! Ikki forstýra hann. Beint tá ið eg kom, setti hann í "De lekte guldtavl ved breden bord," og tú kanst ætla, at eg hevði ikki hjarta at órógva hann."

Men hetta legði maðurin einki í, hann leyp upp í trappurnar, og tað vardi ikki leingi til doktarin kom. Napoleon Nolsøe, doktari, var tiltikin at vera ferðafúsur.

Napolen giftist á eldri árum við Henriettu Elisabeth f. Løbner. Hon var dóttir Emil Løbner, sum var kommandantur á Skansanum og amtmaður. Tey fingu eingi børn.

Hann var tingmaður 1852-1854 og 1865-1869.

**Komandi partur**
Komandi partur verður um Polinu Sofía og mann hennara Jóannes Lambaa, kendur sjómaður og handilsmaður